# Bóðu arbeiðsgevarar hugsa seg um einaferð afturat

**Arbeiðarafeløgini í verkfalli bjóðaðu í gjáramorgunin arbeiðsgevarunum til nýggjan fund**

VERKFALL
*Áki Bertholdsen*



*Vit kunnu ikki slaka meiri og tí hava vit biðið arbeiðsgevararnar umhugsa seinasta tilboð okkara einaferð enn, sigur Ingeborg Vinther sum her er á seinasta samráðingarfundinum týsmorgunin*

Arbeiðarafeløgini í verkfalli lógu ikki longi á boðunum frá Løgmanni.

Løgmaður heitti í fyrrakvøldið inniliga á partarnar á arbeiðsmarknaðinum um enn einaferð at sessast við samráðingarborðið fyri at royna at finna eina loysn á verkfallinum, so at samfelagið fæst ígongd aftur.

Og longu í gjáramorgunin sendi arbeiðarafeløgini í verkfalli arbeiðsgevarunum nýggja innbjóðing um fund.

Men samstundis gjørdi arbeiðarafeløgini greitt, at feløgini í verkfalli kunnu ikki slaka meiri, tí tey hava longu slakað nógv meiri enn ætlanin nakrantíð var.

Tískil bjóðaðu arbeiðarafeløgini í verkfalli arbeiðsgevarunum til at at skrivað undir tað síðsta tilboðið frá feløgunum.

Tað tilboðið er, at tímalønin skal hækka fýra krónur um tíman 1. mai í ár og aftur fýra krónur 1. mai komandi ár. Samstundis vilja vit hava 0,5% í eftirløn um árið.

– Vit skilja, at nógvir av limum tykkara nú eru komin sera illa fyri av verkfallinum og verkbanninum, og ikki minst er hetta galdandi fyri alivinnuna, søgdu arbeiðarafeløgini í fundarfráboðanini til arbeiðsgevararnar.

– Vit fara at heita á tykkum um enn einaferð at umhugsa seinasta uppskot okkara, ikki minst við atliti til truplu støðuna hjá egnu limum tykkara, løgdu feløgini afturat.

Jan Mortensen á Arbeiðsgevarafelagnum segði beinanvegin í gjáramorgunin, at tað kemur als ikki upp á tal at góðtaka tilboðið frá arbeiðarafeløgunum.

Teirra seinasta tilboð er at lønarhækkingin skal vera minni enn fýra krónur um árið, tá ið eftirlønin er tald uppí og longur vilja teir ikki vikast.

# Verkfallið: Vit eru eru longu farin niður um minstamarkið

**– Vit hava longu slakað niður um tað, sum limir okkara høvdu sett sum minstamark og vit kunnu ikki slaka meiri, sigur Ingeborg Vinther**

VERKFALL
*Áki Bertholdsen*



*– Arbeiðarafeløgini í verkfalli hava gjørt tað, sum tey kunnu. Nú er restin í hondunum á arbeiðsgevarunum, segði IngeborgVinther á miðdegi í gjár. Samráðingarfundurin týsmorgunin var stuttur - og úrslitaleysur*

– Vit kunnu ikki slaka meiri. Tí vóna vit, at arbeiðsgevararnir taka av okkara seinasta tilboðið.

Beint fyri døgverða í gjár hevði Ingeborg Vinther ikki heilt mist trúnna uppá, at tað skuldi fara at eydnast at finna eina semju við arbeiðsgevararnar, so at ein endi kundi fáast á verkfallinum.

Men hon leggur dent á, at tað eru ikki arbeiðarafeløgini í verkfalli, sum hava forða fyri at ein semja kundi fáast.

Upprunaliga kravdu vit at tímalønin skuldi hækka 12,60 krónur um árið í ár og tað sama næsta ár.

Síðani slakaðu vit niður í 8,24 krónur um árið og síðani aftur bæði niður í 7,00 krónur, 6,00 krónur og 5,00 krónur um árið.

– Og seinasta útspæl okkara er, at vit hava góðtikið, at tímalønin hækkar 4 krónur í ár og aftur 4 krónur næsta ár, men so skulu vit hava 0,5% afturat í eftirløn um árið, sum er minni enn 50 oyru afturat um tíman.

– Hinvegin hevur Føroya Arbeiðsgevarafelag bert førkað seg frá kr. 2,00 krónum um árið upp í 3,70 krónur um árið.

– So kann ein og hvør roknað út, hvør hevur víst góðan vilja fyri at fáa semju og hvør ikki hevur, sigur Ingeborg Vinther.

Hon sigur, at á einasta samráðingarfundinum var í veruleikanum ikki talan um samráðingar

– Tað, sum hendi, var, at arbeiðsgevararnir góvu arbeiðarafeløgunum eini kravboð. Og tað var, at lønin skuldi hækka minni enn 4 krónur um tíman í ár og aftur tað sama næsta ár, tá ið eftirlønin er tald uppí.

Um Løgtingið leggur uppí, fara vit at heita á øll fakfeløg í landinum og limir okkara kring Føroya land, um at stuðla teimum tiltøkum, sum vit fara at seta í verk.

Ingeborg Vinther sigur, at arbeiðaragfeløgini hava longu slakað væl meiri niður um tað minstamark, sum fakfelagslimirnir frammanundan høvdu álagt samráðingarnevndini ikki at fara niðurum.

– Tað hava vit gjørt fyri at gera okkara til at fáa eina semju, men tíverri vilja arbeiðsgevararnir ikki førka seg so mikið, at tað ber til.

Ingeborg Vinther er eisini fullgreið yvir, at støðan er hættislig nógva staðni í samfelagnum.

– Men fólk eiga eisini at minnast til, at tað eru tveir partar, sum samráðast. Og skyldina fyri, at verkfallið ikki langt síðani er endað, liggur hjá arbeiðsgevarunum.

– Tað verður ofta lagt eftir arbeiðarafeløgunum sum um at tey eru einasti parturin í hesum málinum. Men tað eru tveir partar, sum samráðast og ábyrgdin liggur ikki hjá øðrum partin einsamøll, sigur Ingeborg Vinther.

Á miðdegi í gjár vóru sostatt framvegis ongi útlit fyri at longsta verkfall á privata arbeiðsmarknaðinum síðani araldsdagar, kundi fáa ein enda.

# Arbeiðsgevararnir: Politikararnir vísa ikki ábyrgd fyri samfelagnum

**– Er hetta støðan hjá politikarunum, skulu vit gloyma alt um ein sjálvberandi búskap, sigur Føroya Arbeiðsgevarafelag**

VERKFALLINUM
*Áki Bertholdsen*



*Eftir samráðingarfundin týsmorgunin góvu arbeiðsgevararnir skarvin yvir. Tað eroabyrgdarleyst at politikararnir ikki vilja leggja uppí, sigur Jan Mortensen*

– Politikararnir vísa ikki ábyrgd fyri landinum.

Tað er tann turrisliga staðfestingin hjá Føroya Arbeiðsgevarafelag eftir at landsstýrið hevur gjørt av at tað fer ikki at kalla tingið saman at viðgera verkfallið.

Eftir at samráðingarfundurin týsmorgunin var endað-ur úrslitaleysur, góvu arbeiðsgevararnir skarvin yvir og tað boðaðu teir Løgmanni frá.

Men á landsstýrisfundi týskvøldið gjørdi landsstýrið greitt, at tað fer ikki at leggja seg út í samráðingarnar, tí hetta er eitt mál, sum partarnir á arbeiðsmarknaðinum eiga at loysa sjálvir.

– Sostatt kunnu vit staðfesta, at politikararnir eru ikki sinnaðir at taka ábyrgdina av samfelagnum, sigur Jan Mortensen.

Hann veit við vissu, at bara um eini tvey ár, er alivinnan bara helvtina av tí, sum hon er nú, tí so stórar trupulleikar er hon komin í, bæði av vánaligum prísi, sjúku og so eisini av verkfallinum og teimum kostnaðarøkingum, sum tað førir við sær.

– So er spurningurin, hvussu verður við øðrum vinnum. Men sum útlitini eru, fer fiskaarbeiði ikki at veksa, heldur fer tað at minka.

– Eg veit, at fyritøkur hava verið uttanlands og leita eftir møguleikum at lata virki upp har, heldur enn í Føroyum, eitt nú í Póllandi.

– Sostatt er vandi fyri, at virki í Føroyum verða niðurløgd. Í øllum førum er veruligur vandi fyri, at nýtt virksemi, sum kundi verið í Føroyum, ístaðin verður lagt í onkrum øðrum landi, eitt nú til Póllands.

Men hann vil ikki nevna, hvørjar fyritøkur, talan er um.

– Tað er ikki vist, at nakað hendir beint nú. Men gongdin er greið, at er lønarvøksturin í Føroyum so stórur, sum hann er, uttan at nakar hevur áhuga fyri at gera nakað við tað, verða tað framleiðslur, sum verða lagdar í útlondum, heldur enn í Føroyum.

Men hann leggur afturat, at tað, at politikarnir onki vilja gera við tað, er eisini ein støða at taka.

– Tað er eitt greitt afturstig, at tað er komið hartil, at Løgtingið átti at lagt uppí, tí tað loysir onki mál í longdini.

– Men tað er greitt, at partarnir á arbeiðsmarknaðinum eru ikki førir fyri at finna eina ábyrgdarfulla loysn.

– Og tað sær heldur ikki út til, at politikararnir halda, at tað er teirra uppgáva og tað er so eisini ein støða at taka.

Jan Mortensen leggur afturat, at sum gongdin er, skulu vit gloyma alt um ætlanina hjá landsstýrinum um ein sjálvberandi bú-



# Tíð til seming

**So lítið skilir partarnar nú, at semingsmaðurin átti at gjørt enn eina roynd at fingið partarnar til semingsborðið. Tað heldur Jákup í Gerðinum, sum er ein tann mest royndi semingsmaðurin í Føroyum. Partarnir eiga at sita saman, til ein loysn er funnin. Um neyðugt í dagavís**

VERKFALL
*Ingi Rasmussen*



*Jákup í Gerðinum (uttast vinstumegin) í vælmaktini. Semingsmaðurin heldur, at partarnir skulu sita saman í dagavís, so teir ikki koma til nýggjar kreftir og fara aftur til útgangsstøðið.*

– Hevði tað verið í mínari tíð, so hevði eg kallað partarnar saman alt fyri eitt.

Soleiðis sigur ein tann mest garvaði semingsmaðurin Jákup í Gerðinum um støðuna á privata arbeiðsmarknaðinum. Persónliga dámar honum lítið, at løgtingið skal avgera stríðið, og tað er heldur ikki ætlanin hjá løgmanni, sum støðan er.

Verkfallið er skorið niður til at snúgva seg um eina krónu. Feløgini á privata arbeiðsmarknaðinum boygdu seg týsdagin heilt niður á eina lønarhækking á fýra krónur um árið, pluss eitt hálvt prosent omaná lønina í eftirløn. Arbeiðsgev-ararnir vildu ikki fara um tað markið, teir høvdu sett, sum var fýra krónur omaná tímalønina um árið við eftirløn.

Altso eru tað 50 oyru um árið, sum skilja partarnar. Ella ein króna yvir tvey ár.

– Tað var ikki hildið at vera nógv í mínari tíð, men partarnir hava eftir øllum at døma sett eitt mark, sum er torført at koma forbí. Eg haldi, at eg hevði kannað, um tað var so stutt millum partarnar, sum tað ljóðar, og so hevði eg gjørt eina roynd, sigur Jákup í Gerðinum.

## Skulu sita saman

Tað var týsdagin, at Føroya arbeiðsgevarafelag bjóðaði teimum fimm arbeiðarafeløgunum til fundar við einum tilboði. Teir vildu samráðast, um semja kundi fáast á einum grundarlagi, sum lá millum 3,70 krónur, ið varð seinasta semingsuppskotið, og 4 krónur. Arbeiðarafeløgini møttu, men vildu ikki koma niður um tær fýra krónurnar, pluss eftirløn. Longu eftir tveimum tímum strandaðu samráðingarnar.

Tað er alt ov tíðliga, heldur Jákup í Gerðinum.

– Tað hevur týdning at vera saman, so partarnir kunnu mýkja hvønn annan. Tað skal ikki bera pørtunum til alla tíðina at fara hvørt til sítt, tí so fáa teir nýggjar kreftir og fara aftur til útgangsstøðið, og so er líka vítt sum sýtt. Tað er uppgávan hjá semingsmonnunum at halda partarnar til, so framhald og kontinuitetur alla tíð er í samráðingunum, og tað hevur ikki verið óvanligt at sitið í fleiri samdøgur út í eitt, sigur Jákup í Gerðinum, sum heldur sína rekord vera 100 tímar í eitt koyr.

## Persónligt stríð

Verkfallið er sloppið at ganga alt ov leingi, heldur garvaði semingsmaðurin. Tað hevur gjørt, at tað stendur sum í berginum. Langa verkfallið, sum fer inn í fimtu vikuna, hevur gjørt tað verri, at koma burturúr naggatódnini, tí stríðið er vorðið persónligt millum samráðingarfólkini.

– Tónin hevur verið syndarligur, og tað tykist at vera heilt galið við kemiini millum fólk. Tað hevur stóran týdning undir slíkum samráðingum, at partarnir kunnu tosa saman, hóast teir eru ósamdir og hava hvør sítt mál. Tað er eisini uppgávan hjá semingsmonnum at ganga ímillum, sigur Jákup í Gerðinum.

Kanska var tað byrjanini, tað var galið við, heldur hann. Eitt nú legði semingsmaðurin út við, at hann ætlaði at steingja fólkini inni sjálvan 1. mai, altjóða arbeiðaradagin.

Seinni hava fakfeløgini verið harðlig við serliga Suna Szhwartz Jacobsen, semingsmann, og hava kært hann fyri vinnumálaráðið. Hóast tónin onkuntíð var harður, heldur Jákup í Gerðinum seg ongantíð hava verið úti fyri slíkum.

Hóast klandur og agg heldur hann tíðina verið komna, at semingsmenninir gera enn eina roynd. Tí, sum hann sigur, eitt 50 oyra er onki at streyka fyri.

## Tilboð stendur við

VERKALL
*Ingi Rasmussen*

Føroya arbeiðsgevarafelag hevur í skrivi til arbeiðarafeløgini boðað frá, at tilboðið um samráðingar millum 3,70 og 4 krónur stendur við. Felagið kann ikki góðtaka 4 krónur pluss 0,5 prosent í eftirløn oman á lønina, soleiðis sum arbeiðarafeløgini skutu upp mikudagin.

Føroya Arbeiðsgevarafelag kann ikki slaka meira, tí sum búskaparliga støðan er vorðin, hóttir hetta arbeiðspláss, og útflutningsvinnan kemur í svárar trupulleikar, sigur felagið.

Føroya Arbeiðsgevarafelag heitir tí aftur á arbeiðarafeløgini um gjølla at umhugsa støðuna aftur út frá búskaparstøðuni í landinum og støðuni hjá Føroya fólki, sum eru í vanda fyri at missa arbeiðspláss síni.

## Semingsmenn til reiðar

SEMING
*Ingi Rasmussen*

– Um partarnir sjálvir megna at finna eina loysn, so er tað best. Men vit eru til reiðar, um boð eru eftir okkum.

Soleiðis sigur Suni Schwartz Jacobsen, annar av semingsmonnunum í trætuni á privata arbeiðsmarknaðinum.

Semingsmenninir kastaðu frá sær, tí so langt var millum tað, sum arbeiðarafeløgini kravdu, og tað, sum arbeiðsgevararnir vildu lata. Undir seinastu royndunum at semjast eru partarnir kortini komnir so tætt hvørjum øðrum, sum ongantíð áður.

– Nú er so tætt, at tað kundi hugsast, at vit aftur koma upp í leikin, men tað liggur ikki í kortunum beint nú. Best hevði verið, um partarnir sjálvir megna at finna eina loysn, sigur Suni Schwartz Jacobsen.

# Landið aftrar seg við at leggja uppí

**Politisk inntriv eru áður gjørd á privata arbeiðsmarknaðinum í líknandi støðum, sum vit nú eru í. Men løgmaður slær fast, at tað hevur landsstýrið ongar ætlanir um, hóast alivinnan og arbeiðspláss eru í vanda**

VERKFALL
*Ingi Rasmussen*

Á gøtuni hoyrast fólk ynskja verkfallið niður og norður, og fleiri vóna, at politiski myndugleikin setir eitt punktum við lóg. Men landsstýrið hevur ongar ætlanir um at loysa knútin á privata arbeiðsmarknaðinum.

Tað gjørdi løgmaður púra greitt eftir landsstýrisfundin í týskvøldið, eftir at enn ein samráðingarroynd var slitnað. Hann heitti í staðin á partarnar um at finna saman aftur beinanvegin.

– Partarnir á arbeiðsmarknaðinum hava samráðingarrætt, og tað merkir eisini, at teir hava nakrar skyldur og ábyrgd at finna loysnir. Um politiska skipanin skal inn at finna loysnir, so er tíðin komin at taka av skipanina, vit hava, har partarnir á arbeiðsmarknaðinum samráða seg til sáttamálar, segði Anfinn Kallsberg í Tinganesi týskvøldið.

Hann ásannaði, at stór virði fara fyri skeyti, bæði í alivinnuni og aðrastaðni.

– Beint í løtuni hvørva arbeiðpláss, sum ikki koma aftur, og um onki hendir nú, so hava vit stórt arbeiðsloysi í Føroyum um fáa dagar ella tímar, segði løgmaður.

Kortini er onki politiskt inntriv í væntu í løtuni. Tey hava annars ikki verið óvanlig í Føroyum í líknandi støðum.

Verkføll hjá Føroya arbeiðarafelag vóru steðgað bæði í 1985 og 1987, hjá feløgum í sjúkrahúsverkinum í 1989, og lagt er eisini upp í verkføll hjá Skipara- og navigatørfelagnum tveir ferðir síðstu árini.

Tá landsstýrissamgongan við Atla Dam løgmanni á odda legði upp í verkfallið í 1987 við løgtingslóg, vóru grundgevingarnar líkar teimum, vit hoyra í dag.

»Verkfallið hevur staðið við í tríggjar vikur, og semingsstovnurin hevur endaliga og avgjørt boða frá, at eingin samráðingarloysn fæst til vega. Tí er bert í at velja uppílegging frá løgtinginum ella framhaldandi verkfall og verkbann, til annar parturin liggur eftirá. Hetta seinasta rakar stórar partar av samfelagnum og øðrum fakfeløgum, sum ikki kunnu medvirka til eina loysn á trætuni, t.d. skúlaverkið, heilsuverkið, fiski- og útróðrarmenn, alivinnu og búnaðarvinnu, har milliónavirði fara fyri skeyti, umframt at framhaldandi ósemja elvir til størri vørutrot hjá almenninginum«, skrivaði landsstýrið í viðmerking til lógaruppskotið, sum steðgaði verkfallinum tá.

Núverandi støða ljóðar sum eitt deja-vu frá 1987, vil onkur siga. Men hóast vit hava havt verkfall í fýra vikur í Føroyum, ætlar sitandi landsstýri so ikki at gera táverandi stýri kynstrið eftir. Partarnir mugu sjálvir loysa málið, er boðskapurin. Tá blaðið fór til prentingar, vóru framvegis ongar ábendingar um, at tað fór at bera til.